# Landaðu í Føroyum og Noregi



**Seinnapartin leygardagin fór Christian í Grótinum av Klaksvík vestur um Føroyar at royna eftir svartkjafti**

FISKISKAPUR
*Rúna Sivertsen*

Fríggjadagin legði Christian í Grótinum 2000 tons av svartkjafti upp í Fuglafirði. Teir hava roynt vestan fyri Føroyar og løgdu leygardagin leiðina vestur um aftur at royna.

Vit ringdu umborð beint eftir, at skipið var farið av Klaksvík.

Bogi Rasmusen, skipari, sigur, at fiskiskapurin er misjavnur, men hesin túrurin, sum vardi eina viku, kann sigast at vera góður.

Bogi visti eisini at siga, at Norðborg, sum partafelagið Christian í Grótinum eigur, hevur lagt smá 850 tons av sildaflaki upp í Tromsø í Noregi.

Tað vóru 2 vikur frá tí, at Norðborg fór av Klaksvík, til teir høvdu landað í Noregi.

Norðborg hevur roynt við Svalbard og í altjóða sjógvi, og fóru teir nú norður aftur móti Svalbard at royna í norskum sjógvi.

Kristian Martin Rasmussen er skipari á Norðborg.











# Vilja tryggjað at alt verður tikið við

**Málsetningurin er, at útreiðslurnar skulu ikki veksa meiri enn inntøkurnar, sigur Løgmaður**

FÍGGJARLÓGIN 2003
*Áki Bertholdsen*



*Fíggjarlógin skal altíð hækka minni enn tann búskaparligi vøksturin er, so fyri ein part leggja karmarnir seg sjálvir, sigur Anfinn Kallsberg, Løgmaður*

– Útreiðslurnar á fíggjarlógini skulu ikki veksa meiri enn inntøkurnar.

Tað er ein grundleggjandi málsetningur, sum samgongan hevur sett sær á fíggarliga og búsksparliga økinum.

Og tað fer at síggjast aftur, nú arbeitt verður við at leggja fíggjarlógina fyri komandi ár,sigur Anfinn Kallsberg, løgmaður.

Í samgonguskjalinum stendur, at »búskaparliga skal munurin millum inntøkur og útreiðslur á fíggjarlógini vaksa positivt á hvørjum ári«.

– Hetta merkir, at vøksturin í útreiðslunum skal altíð verða minni enn vøksturin í inntøkunum, sigur løgmaður.

Hann sigur, at hendan málsetningin hevur samgongan sett sær, at tað yvirskotið sum er á fíggjarlógini, skal ikki útholast framyvir.

Anfinn Kallsberg sigur, at sostatt verður tað búskaparligi vøksturin í samfelagnum sum ger av, hvussu útreiðslurnar á fíggjarlógini hækkað. Er búskaparligur vøkstur, er eisini rúmd fyri at hækkað útreiðslurnar.

Annars vil løgmaður ikki siga nakað um komandi útreiðslurnar.

– Men í løtuni er búskaparligur vøkstur. Samstundis vita vit, at lønirnar eru hækkaðar og rakstrarútreiðslurnar eru eisini hækkaðar og somuleiðis tær lógarbundu útreiðslurnar og tað fer at síggjast aftur í fíggjarlógini

Sostatt er greitt, at javnvágin í fíggjarlógini næsta ár verður hægri enn á fíggjarlógini í ár.

Men hvussu nógv, vil hann ikki siga. Hann vil heldur ikki siga, um rúmd verður fyri øktum tænastum, tvs um fíggjarlógin fer at hækka meiri enn øktar lønarútreiðslur og aðrar kravdar útreiðslur hækka.

– Karmarnir verða fyri ein stóran part lagdir av sær sjálvum, tí vit hava fingið eina meting av, hvussu búskaparligi vøksturin verður og tá ið fíggjarlógin altíð skal veksa minni enn tað, leggja karmarnir seg fyri ein stóran part sjálvt, sigur Anfinn Kallsberg.

Samstundis er eisini greitt, at samgongan hevur sett sær fyri at lækka skattin.

– Vit mugu ansa eftir príshækkingum, sum aftur føra økt lønarkrøv við sær, tí tað kemur ikki altíð løntakarunum til góðar, tí prísirnir hækka samsvarandi. Tað sum hendir, er, ofta, at at lønirnar hækka, men keypiorkan hækkar ikki kortini, tí prísirnir hækka tilsvarandi.

– Tað hava vit ov nógv dømi um. Tað, vit mugu gera, er at leggja til rættis soleiðis, at tann tøka lønin hækka og tað gerst best við at lækka skattin, sigur Anfinn Kallsberg.

# Heldur kortini tætt inn at sær

**Karsten Hansen vil onki siga um tølini á fíggjarlógini fyri næsta ár**

FÍGGJARLÓGIN 2003
*Áki Bertholdsen*



*Ynskini eru aftur í ár nógv størri enn tað, sum letur seg gera, sigur Karsten Hansen*

Í løtuni verður arbeitt av øllum alvi í landsstýrinum við at fyrireika fíggjarlógina fyri næsta ár.

Fíggjarlógin skal verða løgd fyri tingið í seinasta lagi 1. oktober, so í løtuni fer mesta arbeiðsorkan hjá landsstýrinum til at fáa samgonguna at semjast um eina fíggjarlóg.

– Í ár er arbeiðið eitt sindur seinkað afturímóti tí tað plagar, men tað kemst av, at løgtingsval var í vár og at tað gingu fleiri vikur til nýggj samgongað varð skipað og tað seinkaði arbeiðnum, sigur Karsten Hansen, landsstýrismaður í Fìggjarmálum.

Men hann leggur kortini afturat, at fíggjarlógin sjálvsagt verður klár sum ætlað.

Annars vil Karsten Hansen onki siga um, hvussu arbeiðið gongst og hann vil heldur ikki siga nakað um tølini á fíggjarlógini.

Men hann sigur, at landsstýrið er samt um høvuðskarmarnar, men enn er langt eftir á mál, áðrenn tað verður greitt, hvussu krónurnar í karminum skulu býtast sundur.

Tó sigur hann, at árið í ár er onki undantak: Ynskini frá teimum ymsu landsstýrisfólkunum eru aftur í ár nógv hægri enn rúmd verður fyri, so tað verður verri enn so at øll ynski verða gingin á møti.

Landsstýrið hevur verið saman á Viðareiði at tosa um fíggjarlógina og har vórðu høvuðstølini løgd.

Karsten Hansen sigur, at fíggjarlógin verður løgd eftir eini yvirskipaðari ætlan, har vælferð, øktar útreiðslur og skattalættar verða sett upp ímóti hvørjum øðrum í eini heild, so at øll tølini ganga upp og tí kann hann heldur ikki siga nakað um, hvussu nógv verður sett av til hvat.

## Samgonguskjalið um fíggjarpolitikkin

**Hetta er tað, sum samgonguskjalið sigur um politikkin, sum skal førast á fíggarliga økinum tey næstu fýra árini**

FÍGGJARLÓGIN 2003
*Áki Bertholdsen*

Nú landsstýrið telvar um fíggjarlógini fyri komandi ár, kann tað vera hóskandi at tríva í tað, sum fólkaflokkurin, sjálvstýrisflokkurin, tjóðveldisflokkurin og miðflokkurin samdust um í samgonguskjalinum, sum teir samdust um, tá ið samgongan varð skipað í vár.

Í samgonguskjalinum stendur m.a. , at førast skal ein varin og ábyrgdarfullur búskaparpolitikkur, har grundstøðið undir búskapinum er framleiðsluvirðið í landinum.

– Politiska endamálið við fíggjarpolitikkinum er at laga føroyska búskapin til ein sjálvberandi búskap, har allir borgarar hava javnbjóðis møguleikar, har vælferðin hjá føroyingum verður ment, har samfelagnum verður tryggjað eitt sunt støði fyri sjálvsmenning og búskaparligum sjálvbjargni og har javnvág verður millum privat og alment fyritaksemi og íløgur.

Men tað stendur eisini, at munurin ímillum inntøkur og útreiðslur á fíggjarlógini skal veksa á hvørjum ári.

Harafturat stendur, at miðast skal eftir at gjalda niður skuld skjótari enn ætlað.

Samstundis verður blokkstuðulin fastfrystur, búskapargrunnur skal setast á stovn og almennar langtíðar verklagsætlanir skulu gerast og fylgjast í verki.

### Skatturin lækkast

Afturat hesum skal skatta- og avgjaldspolitikkurin eggja til, at tað loysir seg at arbeiða, framleiða, spara saman og gera íløgur.

Samgongan er samd um, at tað er neyðugt at linka skattin fyri at lætta um hjá húskum og einstaklingum. Tað er eisini neyðugt at lækka kostnaðarstøðið, bøta reallønina og styrkja kappingarførið.

Tí verður botnfrádrátturin hækkaður og allir prosentsatsir á skattaskalanum stigvíst lækkaðir, serliga hjá lág- og meðalinntøkum. Samstundis skal marginalskattamarkið stigvíst hækkast til at liggja oman fyri sáttmálalønina hjá verkafólki.